# Jústinus og Rognini

MARJUS DAM
løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



**Sum er veit ongin nakað. Skip kunnu taka alt, men kapacitetur er ikki at taka ímóti á landi. Tey kunnu lata vera við at taka nakað sum helst. Og virkir fara á húsagang á landi. Neyðugt er at stabilitetur kemur innan økið. Tí er neyðugt at lóggeva. Tað er best fyri allar partar – og sømiligt fyri Løgtingið at fáa avgreitt**

Eftir at hava lisið greinina hjá Jústinesi Eidesgaard, rithøvundi, hugsar ein hvat endamálið er við henni. Tað tykist sum mjólkin var súr hjá Jústinusi - um ein skal døma eftir greinini. Hann spyr, hví ein roynir at gera nakað í ár, ístaðin fyri í fjør. Eg haldi, at tað er gott, um nakað verður gjørt í ár – sjálvt um betur hevði verið, um málið var avgreitt fyri 10 árum síðani. Men at ov lítið varð gjørt ífjør ella fyri 5 árum síðani, kann ikki nýtast sum undanførsla fyri onki at gera í ár.

**Principp**:

Málið at taka innmat (rogn, livur, sil, fiskamagar o.a.) hevur at gera við eitt principp. Nevniliga at gagnnýta ráværuna, ið verður tikin upp úr havinum. Tað hevur onki at gera við partapolitikk ella lokalpolitikk, men við politikk av hugsjónarligum slagi. Á hesum øki, eru helst flestu flokkar samdir um høvuðsprincippið. Men vit mugu fara fram við skili. Onki at gera er tað sama, sum onki skil at hava. Tað kann ikki ganga til longur. Tað gongur nevniliga ikki, bert at lata standa til. Vit skulu ikki bert reka við streymi og vindi. Uttan mál og mið. Vit skulu sigla – eftir eini kós, ið vit stinga út í korti, politiskt í hesum føri. Til gagn fyri land og fólk. Hendan samgongan og løgtingi megnar vónandi tað, ið ikki hevur verið gjørt á hesum øki áður. Tað vóni eg.

Vit fingu eina fiskidagaskipan – ið skuldi forða fyri, at fiskur varð tveittur útaftur. Alt skuldi førast til lands. Tað var andin í lógini. Nú uppliva vit, at meginparturin av fiskinum verður tveittur útaftur.

Hví skal Kovin innflyta rogn til útflutning, tá nóg mikið av rognum er til í Føroyum? Hví tørvar livravirkinum livur, tá nóg mikið er til av livur í Føroyum. Og hví innflyta livur í dós til 150 kr / kilo, ístaðin fyri at útflyta somu vøru?. Her eru nógv trygg arbeiðspláss, ið verða tveitt burtur

Hetta kann føroyska fólkið ikki liva við. Her er eitt potentiali, ið Føroyar kunnu nýta

Ongin hevur nakrantíð gjørt nakað munadygt politiskt við hendan spurning. Vit hoyrdu Stjóran í Kovanum siga, at hann hevur roynt í 8 ár, men tað gongur skeiva vegin.

B Kalso royndi í fjør at koma við livradøgum, har skip fingu fiskidagar fyri at taka livur. Hetta er eitt framstig, men ikki nóg gott.

Hví ikki geva fiskidagar fyri at taka rogn? Tað vil bøta um støðuna, men er ikki nóg gott eftir míni hugsan.

**Ein nýggj tíð**

Eg meti, at vit hava latið staðið til nóg leingi. Mín niðurstøðan er, at tað gongur ikki longur. Rogn, livur og innmatur mugu nú løggevast uppá land.

Við at gera tað, koma vit samstundis at tryggja, at virkir, ið fáast við hesar úrdráttir fáa ráværuna, ið er alfa og omega, hjá einhvørjum virki. Hesa ráværu kunnu vit ikki blaka fyri borð. Tað eigur og skal steðgast sum skjótast.

Um vit ikki taka ráværuna upp á land, so missa vit pening og arbeiðspláss.

Spurningurin eigur at avgreiðast í smb við lógina um vinnuligan fiskiskap. Tí so fær vinnan á sjógvi og landi at vita, hvussu leikur fer á hesum øki komandi árini. Og tað gevur ein stabilitet, ið er neyðugur hjá øllum.




# Jack Kampmann í Føroyahúsinum

**Føroyahúsið byrjar aftur eftir summarsteðgin. Fyrsta tiltakið er framsýning við myndum hjá Kampmann, sum hevði stóran týdning fyri føroyska list í fimtiárunum.**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Fernisering við myndum hjá listamanninum Jack kampmann (1914 – 1989) verður sunnudagin 13. august kl. 15 – 17. Føroyahúsið skipar fyri saman við Galleri A`Creation í Vendersgade, sum eigur tær nógvu myndirnar. Undir ferniseringini fer listamaðurin Jørgen Tang Holbek, sum arbeiddi saman við Kampmann, at siga frá Kampmann, hansara list og hansara týdning fyri føroyska list í 50`unum og 60`unum.

Jack Kampmann var av dosnkum fólki, men vaks upp í Onglandi og USA. Hann varð sendur við breska herinum til Føroya, har hann fann gentu sína, giftist og búsettist í Vestmanna. Kampmann var sera aktivur listamaður og royndi fleiri teknikkir. Føroyska umhvørvi var av alstórum týdningi hjá honum, og hann hevði eisini sjálvur týdning fyri listarligu menningina í Føroyum í mong ár. Í sekstiárunum fluttu tey til Danmarkar.

Føroyahúsið bjóðar vín og leskimeti undir ferniseringini. Kaffistovan er opin kl. 14 – 18

**Kaffistovan letur uppaftur**

13. august byrjar vanliga virksemi aftur í stovuni í Føroyahúsinum. Opið er allar gerandisdagar kl. 14 – 18. Tá ið tiltøk eru, er opið út á kvøldið.Nýtt fólk er sett fyri Maibritt Jóhannesen, sum fer at lesa.. Gert Róðá fer nú at standa fyri kaffistovuni. Hann er 35 ár og hevur arbeitt innan fyri bakara- og kokkaykri og eisini við diskin.

Týsdagin 15. august verður fyrsti døgverðin, har borðreitt verður við knettum og knettasuppu, kaffi og lagkøka fyri. Eftir døgverðan syngja vit summarsangir og onkur ferðafrásøgn verður eisini. Døgverðar vera sum vant hvørt týskvøld kl. 17.30.

Fótatraðk eigur fyrsta dansikvøldið 2. septembur og Listafelagið ferniseringina 3. septembur, tá ið Høgni Egholm Magnusen fer at hava framsýning. Listafelagið skipar eisini fyri kafékvøldi 1. septembur við, har fotografurin Bárður Eklund fer at siga frá.

Føroyskur partapolitikkur í 100 ár

Ymisk sertiltøk eru hvørt hálvár. Í heyst verður fokus sett á føroyskan politikk politikk, nú tveir teir elstu flokkarnir rundað 100 ár. Hetta fer at vera gjørt við søguligari frásøgn, orðaskifti og pallborðsfundi.

Tann væl umtókta vínveitslan verður 7. oktobur og mentanarnáttin 13. oktobur. Bókavørðurin fer at leggja tveir bókadagar til røættis 17. – 19. novembur, samtíðis sum danska bókamessan er í Forum. Feløgini skipa fyri dansikvøldum, kafékvøldum og venja í húsinum. Kvinnufelagið hevur fleiri áhugaverd evni á skránni. Tey eru eisini komin væl áleiðis við einum minnisriti um felagið 1944 – 2006 og leita eftir myndum, sum kunna vera við at siga søguna um hetta virkna felag.

www.sosialurin.fo

Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

### - Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við teldupostí til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*